# Atli iðrar seg

**KÍ liðformaðurin heldur, at hann og liðfelagarnir áttu at havt syrgt fyri tryggum sigri, áðrenn teir í síðstu løtu fingu brotsspark ímóti sær og harvið mistu sigurin**

B68–KÍ
*Jóannes Hansen*



Liðskiparin hjá KÍ, Atli Danielsen, iðraði seg eftir dystin móti toftamonnum um, at sigurin hjá KÍ glapp á stokkinum
savnsmynd

KÍ liðformaðurin, Atli Danielsen, var serliga harmur, eftir at mjørkastríðið var liðugt.

– Vit mugu staðfesta, at vit hava ikki marginalirnar við okkum í ár. Henda dystin áttu vit at havt vunnið. Vit áttu at havt skorað í hvussu so er eitt mál afturat. Vit kendu okkum ikki hóttar, men tá ið vit so fingu brotssparkið ímóti okkum, var so lítið av tíð eftir, at vit ikki høvdu møguleika at koma afturíaftur.

*Brotssparkið varð dømt ímóti tær?*

– Eg helt meg temja bóltin við økslini. Tað geri eg so ofta, og tað plagar ikki at verða dømt ímóti tí. Tá ið eg hevði sparkað bóltin burtur, kom flaggið spakuliga upp hjá linjuverjanum, sum frammanundan hevði verið sera ótryggur. Mest harmuligt er tað, at eg nýttist yvirhøvur ikki at havt tamt bóltin. Aftaná havi eg fingið at vita, at eingin av mótstøðuspælarunum var í nánd av mær, so eg kundi bara havt latið bóltin farið aftur til Jákup Mikkslen, staðfestir Atli Danielsen, sum er fluttur av framrættaða og á verjukenda miðvallarplássið, eftir at veteranurin Jan Joensen orsaka av skaða í lærkrikanum er givin at spæla.

Eftir sovorðið úrslit ásannar Atli, at tað er minni hugaligt at fara undir fyrireikingarnar til B36 dystin á heimavølli, enn tað hevði havt verið, um KÍ hevði havt vunnið.

– Vit mugu royna at toga okkum uppaftur. Um vit høvdu havt vunnið á Toftum, høvdu vit kanska havt møguleika at blanda okkum í toppin. Nú skal nógv ganga við, um tað skal eydnast. Men vit eiga nógvar marginalar til góða. Tað eru bara vit og HB, sum bara hava tapt ein dyst. Hjá okkum hevur tað verið kostnaðarmikið, at vit so sjey ferðir hava spælt javnt, og soleiðis var tað aftur hesa ferð. Nú mugu vit vóna, at tað fer at koppa okkum til fyrimunar.

# B68 venjarin hevur gott mót

**Trygvi Mortensen heldur, at tað vóru ikki umstøður at spæla á Svangaskarði týskvøldið, og at tað fyri royndina at sleppa undan niðurflyting var rættuliga týdningarmikið, at teir fingu stig**

B68–KÍ
*Jóannes Hansen*

Tað vóru ikki líkindi at spæla. Dysturin átti at havt verið útsettur. Sum venjari havi eg ongantíð upplivað at verið so hjálparleysur, sum eg var hesa ferð. Eg sá bara helvtina av vøllinum, og tískil visti eg ikki, hvat gekk fyri seg í hinum borðinum, og hvat vit møguliga skuldu broyta.

Hetta sigur B68 venjarin, Trygvi Mortensen, sum avgjørt einki hevði havt ímóti, at tað dysturin varð útsettur til mikukvøldið.

– Tá ið alt kom til alt, so eri eg sera fegin um, at tað eydnaðist at fáa stig. Eg haldi, at vit sýndu rættan hugburð og stóðu einki aftanfyri klaksvíkingarnar, og fyri næstu ferðirnar hevði tað rættuliga stóran týdning, at vit fingu nakað burturúr.

*Væntar tú at sleppa undan niðurflytingini?*

– Tað fer at vísa seg. Undir venjingunum og aftur ímóti KÍ sýndu spælararnir avgjørt hugburð, sum ber møguleikar í sær. Men tað er greitt, at tað verður neyðugt at stríðast samstundis, sum eg haldi, at tað leikliga gongur rætta vegin.

Á B68 liðnum týskvøldið var bara ein av trimum nýggjum brasiliumonnum. B68 venjarin sigur, at teir høvdu roknað við, at annar av hinum báðum eisini skuldi havt verið við, men at pappírini vóru ikki komin úr Brasilia.

Í kvøld fer B68 at spæla venjingardyst á Svangaskarði ímóti U–19 landsliðnum. Tá er ætlanin, at nýggju brasiliumenninir skulu fáa høvi at vísa, hvat teir eru førir fyri á vøllinum. So fæst at síggja, hvussu tað verður, tá ið B68 í vikuskiftinum skal til Gøtu at spæla.

# 148 landsdystir í B36-verjuni



**Tað var óivað royndasta verjan í føroyskum fótbólti í mong ár, sum B36 mynstraði í dystinum á Eiði týskvøldið**

ROYND VERJA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað man verða ógvuliga sjáldsamt, at eitt føroyskt lið stillar við fýra leikarum í verjuni, sum tilsamans hava leikt ikki færri enn 148 dystir á føroyska A-landsliðnum, men hetta var tó veruleiki týskvøldið, tá ið B36 vitjaði EB/Streym á Eiði.

Teir fýra í verjuni hjá B36, Allan Mørkøre, Pól Thorsteinsson, Johannus Joensen og Jens Kristian Hansen eru millum royndastu leikararnar í bestu føroysku deildini, og allir fýra hava teir í mong ár verið trúgvir í føroyska landsliðshópinum. Royndastur av teimum fýra er Allan Mørkøre. Klaksvíkingurin hevur leikt 54 landsdystir, men nú er nakað síðani, at hann leikti tann seinasta av hesum. Fyrrverandi liðskiparin á landsliðnum, Jens Kristian Hansen, hevur 44 ferðir umboðað Føroyar í altjóða a-landsdysti.

Miðverjarnir báðir, Pól Thorsteinsson og Johannus Joensen, hava leikt ávíkavist 32 og 18 landsdystir, men hesir báðir eru framvegis fastur partur av landsliðshópinum og fáa tí óivað økt um sítt dystartal.

*Pól Thorsteinsson mannaði saman við Allan Mørkøre, Johannus Joensen og Jens Kristian Hansen verjuna hjá B36 móti EB/Streymi týskvøldið, og tað man óivað verða royndasta verjan í føroyskum fótbólti í mong ár*
savnsmynd

**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 9 | 6 - 2 - 1 | 22 | 9 | 13 | 20 |
| 2 | B36 | 10 | 5 - 3 - 2 | 21 | 12 | 9 | 18 |
| 3 | Skála | 9 | 5 - 2 - 2 | 20 | 10 | 10 | 17 |
| 4 | KÍ | 11 | 3 - 7 - 1 | 16 | 12 | 4 | 16 |
| 5 | NSÍ | 9 | 4 - 3 - 2 | 14 | 11 | 3 | 15 |
| 6 | EB/Streymur | 11 | 4 - 2 - 5 | 17 | 15 | 2 | 14 |
| 7 | GÍ | 10 | 4 - 2 - 4 | 15 | 20 | -5 | 14 |
| 8 | VB | 9 | 3 - 4 - 2 | 13 | 10 | 3 | 13 |
| 9 | ÍF | 10 | 1 - 1 - 8 | 14 | 34 | -20 | 4 |
| 10 | B68 | 10 | 0 - 2 - 8 | 7 | 26 | -19 | 2 |







**Skráin, friggjadagin 6. august**

17:00 Tivoli letur upp úti á Veg.
Tombola, fiskibrunnur, bamsutombola, skjótibreyt, 21-spæl, ballónir, candyfloss og pop-corn. (Tivoli er opið til kl. 22)
17:00 Breyðsøla í Kaffistovuni (Opið er til kl. 23)
Listaframsýning: Marius Olsen
18:00 Í skúlagarðinum er karusell, skreiðiborg, hoppiborgin "Sjórænaraskipið" og asni. (Tiltøkini eru opin til kl. 21)
19:00 Brotssparkskapping í skúlagarðinum (til kl. 22)
19:00 Stevnukioskin letur upp undir Mikkjalsvegi.
Proppagiting: Vinn ein disc-man!
(Kioskin er opin til kl. 22)
19:00 El-bilar til børn 2-8 ár, í skúlagarðinum til kl. 23
19:00 Pylsuvognurin letur upp úti á Veg
(klokkan 23 verður vognurin fluttur niðan í skúlagarðin)
20:00 Kabarettin "Nólsoyarbygd... ein býlingur í Havn" í Royndarhúsinum
21:30 Filmurin "Kópakonan", í Royndarhúsinum
24:00 SHOWMENN spæla til dans í tjaldinum í skúlagarðinum
Gestatónleikarar: Anfinn Nielsen og Terji Rasmussen
24:00 Pylsuvognurin er opin í skúlagarðinum (til kl. 04)

**Skráin, leygardagin 7. august**

10:00 Svimjararnir fara á bláman úti við Strond, Havn
14:00 Stevnan verður sett í Geilini:
Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, heldur røðu.
Barnakór og Nólsoyar sangkór syngja.
15:00 Mat- og ølsøla í tjaldinum keiøkinum (til kl. 24)
15:00 (uml. kl. 15) koma regattasiglararnir til Nólsoyar
15:00 Tivoli letur upp úti á Veg: Tombola, fiskibrunnur, bamsutombola, skjótibreyt, 21-spæl, ballónir, candyfloss og pop-corn (Tivoli er Opið til kl. 24)
15:00 Í skúlagarðinum er karusell, hoppiborg, skreiðiborg og asni. (Tiltøkini eru opin til kl. 21)
15:00 El-bilar til børn 2-8 ár, í skúlagarðinum til kl. 23
15:00 Brostsparkskapping á keiini.
15:00 Stevnukioskin letur upp undir Mikkjalsveggi.
Proppagiting: Vinn ein disc-man!
(Kioskin er opin til kl. 24)
15:00 Fólkaludo á keiini – tekning á staðnum.
15:00 Pylsuvognurin letur upp úti á Veg
(klokkan 23 verður vognurin fluttur niðan í skúlagarðin)
16:00 Loppumarknaður í skúlanum (Opið er til kl. 19)
16:00 Cross-renning uttanfyri Mitlið. Tilmelding leygarmorgun.
16:00 Kabarettin "Nólsoyarbygd... ein býlingur í Havn"
17:00 Breyðsøla í Kaffistovuni
Listaframsýning: Marius Olsen
18:00 Kabarettin "Nólsoyarbygd... ein býlingur í Havn"
21:00 Filmurin "Kópakonan", í Royndarhúsinum
22:00 Felagssangur undir Mikkjalsveggi
(Sanghefti eru til keyps í stevnukioskini)
24:00 SHOWMENN spæla til dans í tjaldinum í skúlagarðinum
24:00 Fimmboði Lisberg/Jógvan Olsen, í Royndarhúsinum
Breyðsøla
24:00 Pylsuvognurin er opin í skúlagarðinum (til kl. 04)

**Skráin, sunnudagin 8. august**

12:00 Guðstænasta v/ Sonju Klein
15:00 Tivoli letur upp úti á Veg.
Tombola, fiskibrunnur, bamsutombola, skjótibreyt, 21-spæl, ballónir, candyfloss og pop-corn (Opið er til kl. 20)
15:00 Pylsuvognurin letur upp úti á Veg (til kl. 20)
15:00 Brotssparkskapping á keiini – um bóltar eru eftir.
15:00 Mat- og ølsøla í tjaldinum á keiini
Breyð, turrur fiskur, spik og epli (til kl. 20)
15:00 El-bilar til børn 2-8 ár, í skúlagarðinum til kl. 20
15:00 Í skúlagarðinum er karusell, skreiðiborg, hoppiborgin "Sjórænaraskipið" og asni. (Tiltøkini eru opin til kl. 18)
15:00 Stevnukioskin letur upp undir Mikkjalsvegi.
Proppagiting: Vinn ein disc-man!
(Kioskin er opin til kl. 20)
16:00 Loppumarknaður í skúlanum
(Opið er til kl. 19)
16:00 Sterkasti maður og fimasta kvinna
Styrkikapping í skúlagarðinum
Tilmelding á staðnum
18:00 Kabarettin "Nólsoyarbygd... ein býlingur í Havn" í Royndarhúsinum
21:00 Filmurin "Kópakonan", í Royndarhúsinum

**Skráin, mánadagin 9. august**

17:00 Í skúlagarðinum er karusell, skreiðiborg, hoppiborgin "Sjórænaraskipið" og asni. (Tiltøkini eru opin til kl. 19)
20:00 Kabarettin "Nólsoyarbygd... ein býlingur í Havn" í Royndarhúsinum

FERÐAÆTLAN Á OVASTEVNU 2004

| Friggjadagin 6. august | | Leygardagin 7. august | | Sunnudagin 8. august | |
|---|---|---|---|---|---|
| Úr Havn | Úr Nólsoy | Úr Havn | Úr Nólsoy | Úr Havn | Úr Nólsoy |
| 06:55 | 07:20 | 11:00 | 11:25 | 10:00 | 10:25 |
| 12:00 | 13:00 | 13:00 | 13:25 | 13:00 | 13:25 |
| 15:20 | 15:45 | 14:00 | 14:25 | 15:00 | 15:25 |
| 16:20 | 16:45 | 18:00 | 18:25 | 19:00 | 19:25 |
| 19:00 | 19:25 | 19:00 | 19:25 | 20:00 | 20:25 |
| 22:00 | 22:25 | 21:00 | 21:25 | | |
| 23:00 | 23:25 | 22:00 | 22:25 | | |
| 03:00 | 03:25 | 23:00 | 23:25 | | |
| 04:00 | 04:25 | 02:00 | 02:25 | | |
| | | 03:00 | 03:25 | | |
| | | 04:00 | 04:25 | | |

Siglt verður til øll eru komin til havnar aftur

ONGAR GLASFLØSKUR SKULU TAKAST VIÐ INN Í TJALDIÐ; MEÐAN DANSUR ER!

Ritan siglir av Bursatanga í Havn
Meðan omafyrisitandi ferðaætlan er galdandi verður ferðaseðil kravdur úr Havn fyri ferð aftur og fram (70 kr.)